

# - Eg havi eitt Jobs tol



*Summi nevna Sofíu Jacobsen fyri "frelsunarher-frúan" og onnur "laksadrotningin". Hetta eru í øllum førum tvey heiti, sum hóska væl til hana*

**Aldurin forðar ikki teirri 84 ára gomlu laksadrotningini Sofíu Jacobsen at fiska laks við Leynavatn, tá høvið býðst. Seinastu vikurnar hevur hon fingið tveir hampiliga stórar laksar. - Tað er ótrúliga stuttligt at standa og fiska, eisini um eg ongan fái. Eg verði so ikki í ringum lagi, um eg komi tómhent til húsa aftur, sigur hon. Seinnapartin í gjár var hon aftur á sínum fasta plássi við Leynavatn**

LAKSAFISKARÍ
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

**Leynavatn:** - Nei, aldurin ger mær ikki mun. Eg dugi altíð at fáa ein laks inn at landi, tá tað ræður um, sigur havnarkvinnan Sofía Jacobsen, frísk og fiskihugað.

Hesa løtuna hevur hon ikki tíð til stórvegis prát, tí nakrar metrar úr landi hevur ein laksur bitið á rækju-agn hennara. Boyan, sum vanliga fer upp og niður eftir smáu aldunum, er nú undir í heilum. Her er fongur í væntu!

Tað er týðiligt at merkja, at hetta er tað stóra kickið, sum einhvør laksafiskari, óansæð aldur og kyn, sær fram til, tá farið verður frá húsum.

- Taðvejden, her er ein á!, kemur teskandi frá henni.

Hon fer róliga á føtur, og dregur spakuliga línuna inn, og gevur síðani út aftur. Tað ræður um ikki at vera ótolin, tí laksurin skal møðast og línan má halda. Ikki fyrrenn tann hvíta síðan á búkinum kemur fram, er tíð at draga fongin inn.

Av royndum veit Sofía, at hetta kann taka sína tíð. Onkutíð skjótari, og onkutíð má tað stóra Jobs-tolið til, um tann stóri laksurin skal fáast til lands. Um tað tekur 15 minuttir ella longur, tað ger einki. Tá tað bítur á, er eingin tíð at hugsa um tíð ella stað.

Andlitið á Sofíu er fult konsentrerað um boyuna, sum nú bert er fáar metrar úr landi. Nærri og nærri kemur hon, men so við eitt setur Sofía seg niður aftur í stólin …?

- Hann slapp!, kemur tað stutt frá henni. - Hann var á eina løtu, men eg lorkaði hann burtur. Hmmm, eg burdi verið eitt sindur meiri tolin í dag, tí so hevði eg fingið hann!

> *Man slappar simpelten so væl av. Ein leggur alt annað frá sær, og tí kann eg sita her í tímavís, bara eg fái loyvi til tað*

Betur gekst henni kortini í farnu viku. Týsdagin fekk hon ein laks, ið vigaði 9 pund og var 73 cm. langur, og fríggjadagin fyri ein annan uppá 5 pund og var 60 cm. langur.

Í gjár kom kortini eingin laksur við heim til hús. Kanska eydnan verður betri næstu ferð.

- Eg ætli mær norður aftur leygardagin at fiska við einum ommubarni. Tú skilir, - hetta er vorðin ein familjusjúka!, sigur hon við einum brosi.

## Stuttligari - stuttligast

Tað er grátt í veðrinum og tað liggur eitt fitt lot oman gjøgnum dalin, hesa løtuna Sofía hevur tikið útgerð sína í hond og er farin á fiskiferð. Men veðurlíkindini gevur hon sær valla far um, tí henda seinnapartin týsdagin skal fiskieydnan roynast einaferð enn.

Her hjá henni er eingin slingur í valsinum, ella nakað sum er latið upp í hendurnar á tilvildini, nú hon hevur gjørt seg út til at fara á Leynavatn:

Í einu hondini ber hon ta innpakkaðu tráðuna, sum so mangan hevur verið henni kær. Á økslini hevur hon ta lítlu og neyðugu taskuna við húkum, agni og øðrum. Og í hini hondini ein samanklappaðan stól. Soleiðis, here I come!

Við tað niðasta vatnið